

# Hagfrøðingar: Lágur oljuprísur í minst trý ár

**Jógvan Hugo Gardar**

05.12.2014 - 10:29

Oljan.fo

Talknúsararnir hjá norsku hagstovuni, Statistisk Sentralbyrå (SSB), hava hugt inn í framtíðina, og teir síggja ein oljuprís sum kemur at halda sær á einum lágum støði í fleiri ár.

Oljuprísurin sum hevur lækka nógv seinastu vikurnar var eitt av høvuðsevnunum tá í gjár legði fram sína meting av norska búskapinum komandi trý árini. Mett verður at samanborið við fíggjarkreppuna í 2008, so kemur oljuprísurin ikki at økja líka skjótt aftur hesaferð.

Hagfrøðingarnir síggja ein oljuprís sum hækkar hesi trý árini, men talan er ikki um nakra stóra hækking, og ikki fyrrenn út á heysti í 2017 kann roknast við einum oljuprís sum liggur um 80 dollarar fatið. Tað segði SSB-hagfrøðingurin Andreas Benedictow.

Hann segði at lági prísurin helst kemur at merkja at minni verður av olju á marknaðinum, samstundis sum fleiri fara at ynskja at keypa olju.

- Men vit rokna ikki við at oljuprísurin við tað fyrsta kemur upp á eitt støði sum hann hevur verið fyrr í ár, segði hann.